Listagluggin - Art gallerie:

# Karmur um onnur kreativ tiltøk

**Fríggjadagin 11. mai var móttøka í nýggja gallaríinum: Listagluggin – Art Gallerie í Niels Finsensgøtu 25 í Havn. Tað eru Mortan C. Carlsen og Katrin Rubek Nielsen, sum eiga og reka nýggja gallaríið**

LIST

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Havnin hevur nú fingið eitt nýtt gallarí í miðbýnum. "Listagluggin – Art Gallerie " í Niels Finsensgøtu fer at leggja seg eftir at sýna fram nútíðarlist umboðað av fremstu føroysku listafólkunum. Eisini fer Listagluggin at sýna fram verk av øðrum listafólkum, umframt at hølini eisini fara at verða karmur um onnur kreativ tiltøk, t.d. sýning av nýggjari føroyskari sniðgeving, sum hevur íblástur úr fremstu mótametropolum úti í heimi, siga Mortan A. Carlsen og Katrin Rubek Nielsen, sum eiga og reka nýggja gallaríið.

Móttøkan var bæði í sambandi við at gallaríið lat upp og í sambandi við at fyrstu framsýnararnir, listamenninir Eyðun av Reyni og Anker Mortensen, lótu sína framsýning upp.

Í síðstu viku skrivaðu vit, at Elisa Heinesen var ein av eigarunum av gallaríinum, men hetta er ikki rætt. Elisa sigur í eini rætting: "Eg eri fegin um at kunna fáa høvi til at vera partur av listarliga umhvørvinum i nýggju spennandi hølunum i Niels Finsensgøtu og eg gleði meg til at seta dato á egin tiltøk, sum hølini hóska sera væl til. Eg eri ikki eigari av Listaglugganum, men eg gleðist um at hava fingið eina eventuella "basu" i miðbýnum í Havn. Eg eri vís í at Listagluggin fer at vera karmur um nógv spennandi tiltøk og helst eisini innan nógvar ymiska kreativer listagreinar".



*Katrin Rubek Nielsen og Mortan A. Carlsen við soninum Magnusi*




*"Listagluggin – Art Gallerie " í Niels Finsensgøtu*



*Listamenninir Anker Mortensen og Bárður Jákupsson*



*Listamenninir Eli Smith og Zacharias Heinesen*




*Fyrstu framsýnararnir í gallaríinum listamenninir Anker Mortensen og Eyðun av Reyni*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu í okkara stóru sorg, tá foreldur, verforeldur, omma og abbi okkara

**Anna á Hædd Stampe**

og

**Willy Stampe**

Klaksvík

andaðust og vórðu jarðað.
Tøkk til Magnus Brahé Jørgensen, prest fyri troystarík orð í kapellinum og Christianskirkjuni.
Tøkk til Hanus Lassen fyri troystarík orð í kapellinum. Tøkk til Dánjal Paula Dalbø fyri troystarík orð í Christianskirkjuni.
Tøkk til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, hornblásara, tykkum sum vitjaðu í heiminum á Nýggjavegi 8, og tykkum sum hjálpu til í samband við ervið.
Tøkk fyri blómur, kransar, og aðrar heilsanir.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu teimum til teirra seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarandi*

**Petur, Finn, Joan, Giggi, Anna, Jan, Elin og Willy**

†



Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at mín elskaði maður, kæri pápi, sonur, versonur og beiggi

**Signar Vilhelmsen**

Sandavágur

andaðist 13. mai, 35 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju Kristi himmalferðardag 17. mai kl. 14.00.

**Lív, Allan Pauli,**
**Paula, Allan, Hallgerð, Johannes**
**og systkin við familju**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Signar Vilhelmsen**, andaðist 13. mai 35 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 14. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju Kristi himmalsferðardag 17. mai k. 14.

**Gunnar Martin Petersen**, vanliga nevndur Gunnaba andaðist í nátt 16. mai 63 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

Kistan við **Heina Hansen, Hoyvík**, fer av Røktarheiminum Mørkini hósdagin 17. mai klokkan 17.30. Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju fríggjadagin 18. mai kl. 14. Tey ið vilja minnast Heina, kunnu lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini, konta í peningastovnunum.

**Dagurin**

**17. mai Bruno**, deyður í 1045. Biskupur í Würtzburg, sum saman við mongum øðrum komst av døgum á eini ferð í Ungarn. Navnið merkir hin brúni.

**18. mai. Eirikur**, deyður umleið 1160. Svenski kongurin Eirikur IX Jeðvarðson, sum varð myrdur av danska prinsinum Magnusi og hansara monnum í Uppsala dómkirkju. Eirikur varð virdur sum svenskt tjóðhalgimenni alla miðøld. Navnið er norrønt og merkir hann sum ræður eina ella æviga.